# Gongur væl hjá Claus og teimum

Blackpool hevur rættiliga fingið fótin fyri seg í triðbestu ensku fótbóltsdeildini. Fyrstu umførini gekk ikki meira enn rímiligt, men nú hevur ligið togað seg langt upp eftir stigatalvuni. Leygdagin spældi Blackpool á heimavølli ímóti Huddersfield, og Blackpool vann dystin 3-1. Fyrrverandi føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen var eykamaður, og hann kom á vøllin móti endanum av dystinum. Blackpool liggur nú nummar 10 av 24 liðum í League One. Liðið hevur 25 stig fyri 18 dystir.



# Norðmaður vil ikki til United

Norska felagið Haugesund hevur sagt nei til eitt tilboð frá enska felagnum Manchester United upp á 16 ára gamla spælaran Håvard Nordveit. Hóast hann bert er 16 ára gamal, hevur hann longu spælt fleiri dystir á besta liðnum hjá Haugesund, og eftir eina royndarvenjing í United, kom enska felagið við einum tilboði til Haugesund.

Men spælarin, familjan og felagið hava í felag gjørt av, at Nordveit skal halda fram at spæla fyri Haugesund eina tíð afturat.

Mjølnir-ÍF 3-0 (25-16, 25-23, 28-26):

# So tapti ÍF

**Mjølnir vann toppdystin ímóti ÍF í meistaradeildini hjá monnum. Sigurin var tryggur, og við hesum eru nú bert tvey stig á muni millum ÍF og Mjølnir í oddinum**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Hvør sær vóru settini spennandi, men við samanlagt 3-0 setti Mjølnir eina tjúkka striku undir, at fuglfirðingar ikki skulu kenna seg serliga tryggar í oddinum*

Undan vikuskiftið var ÍF einasta ósigraða liðið í meistaradeildini hjá monnum. Teir høvdu vunnið flestu dystirnar rættiliga trygt, og einasata liðið, sum veruliga hevði givið ÍF mótstøðu undan vikuskiftinum var Mjølnir, tá ÍF og Mjølnir møttust á Kambsdali í øðrum umfari.

Gongdin hjá Mjølni hevur eisini verið sera góð sísðtu dystirnar, og teir hava vunnið síðstu dystirnar trygt, so lagt var upp til sannan toppdyst, tá hesi bæði liðini hittust í KÍ-høllini sunnudagin.

## Mjølnir van trygt

Tað var eisini Mjølnir, sum kom betri í gongd í toppdystinum í Klaksvík. Spælið, sum teir hava víst síðstu dystirnar, lá enn í teimum, og teir spældu ÍF bæði niður og norður í hesum settinum. ÍF fekk stutt og greitt ongantíð eitt bein til jørðina, og Mjølnir var klárt betra liðið. Endaliga úrslitið av fyrsta setti gjørdist heili 25-16 til heimaliðið, og sostatt høvdu teir fingið eina sera góðan byrjan upp á oddastríðið.

## Bleiv javnari

Í øðrum setti kom ÍF betri við. Nú høvdu teir funnið spælið fram, sum hevur ført teir til sigurs í øllum dystunum í ár, og teir góvu heimaliðnum harða mótstøðu. Liðini fylgdust at kalla alt settið, og munurin var snøgt sagt eingin. At enda megnaði Mjølnir tó enn einaferð at vinna á Íf, og úrslitið av hesum settinum gjørdist 25-23 til Mjølnir.

Nú sá ikki gott út hjá ÍF, og um teir ikki skuldu fáa sítt fyrsta tap í ár, so noyddust teir at vinna restina av settunum. Triðja sett bleiv enn einaferð sera javnt, og munurin millum liðini var ikki serliga stórur. Liðini fylgdust upp eftir, og tey máttu spæla út um tey vanligu 25 stigini. Enn einaferð var Mjølnir tó drúgvari, tá teir at enda vunnu 28-26, og sostatt hevur Mjølnir birt nýtt lív í stríðið um oddasessin. Við sigrinum liggja teir nú javnir á øðru plássi saman við Fram, og tey eru bert tvey stig aftanfyri oddaliðið, ÍF.

SÍ-Fleyr 1-3 (25-21, 25-27, 17-25, 15-25):

# Fleyr vann í Sørvági

**Fleyr vann tryggan sigur á SÍ í sørvági sunnudagin, og við sigrinum nærkast Fleyr medaljunum nakað, meðan SÍ nú er einsamalt aftast**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Leygardagin tapti Fleyr fyri Fram, og tí máttu teir royna at koma aftur á rætta kós, tá teir skuldu til Sørvágs at møta SÍ. SÍ mátti eisini royna at vinna dystin, soleiðis at teir kundu nærkast medaljuplássunum.

Tað var SÍ, sum fekk betru byrjania. Teir løgdu væl fyri í fyrsta setti, og hetta megnaðu teir eisini at vinna 25-21, men so vendi dysturin. Annað sett var ótrúliga javnt, og liðini fylgdust at kalla allan vegin. At enda var tað tó Fleyr, sum dró longra stráðið, og teir vunnu 25-27.

Nú vóru leikararnir hjá Fleyr veruliga komnir fyri seg, og í triðja setti var ongantíð nakar ivi, hvat lið var tað betra. Her vann Fleyr 17-25, og nú stóð illa til hjá SÍ. Aftur í fjórða setti hølvaði Fleyr Í av, og úrslitið í hesum settinum gjørdist 15-25. Sostatt hevur Fleyr nú lagt SÍ aftur um seg, og teir nærkast spakuliga medaljuplássunum.

SÍ-TB 3-2 (21-25, 23-25, 25-23, 25-18, 15-12):

# SÍ basti TB

**SÍ megnaði at halda fast í oddinum, tá tær vunnu ein tepran 3-2 sigur á TB í Sørvági sunnudagin. Tær vóru aftanfyri 2-0 í settum, men megnaðu at venda dystinum síðstu settini**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Bæði SÍ og TB vóru í dysti leygardagin, tá TB vann tryggan sigur á KÍF, meðan SÍ tapti 3-2 á Drátti, eftir at hava ført 2-0. So dystirnir høvdu verið sera ymiskir hjá hesum báðum liðunum leygardagin. Eitt høvdu liðini tó til felags, og tað var, at bæði máttu vinna dystin, um tey vildu halda fast í oddinum í meistaradeildini hjá kvinnum.

## TB byrjaði betur

TB var eisini liðið, sum fekk betru byrjanina henda dagin. Í fyrsta setti vóru tær heldur betri enn sørvingarnir, og tær vunnu eisini hetta settið 21-25. Í øðrum setti var gongdin á leið tann sama. Her var SÍ tó enn betri við, men at enda kláraðu kvinnurnar av Tvøroyri at vinna 23-25. Nú stóð ikki so væl til hjá SÍ, og tær máttu vinna restina av settunum, um tær skuldu vinna dystin.

## Vend kom í

Hetta ljóðaði ikki sum nøkur løtt uppgáva, eftir at hava tapt tvey tey fyrstu settini, men kvinnurnar úr Sørvági gjørdu í øllum førum eina roynd. Triðja sett gjørdist sera spennandi, men hesaferð gjørdist SÍ drúgvara liðið. Tær vunnu settið 25-23, so nú var dysturin knappliga opin aftur. Fjórða settið megnaði SÍ eisini at vinna 25-18, so nú skuldi javnbrótari til fyri at finna ein vinnara, og væl sást, at SÍ hevði funnið stevið. Tær megnaðu nevniliga eisini at vinna javnbrótaran 15-12, og sosatt megnaðu tær at venda einum hóttandi tapi til ein sera týdningarmiklan sigur.